# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Esther Dahl:

## Nýggjur samskipari í Vinnuhúsinum



1. september 2005 byrjar Esther Dahl í starvi í Vinnuhúsinum sum samskipari fyri arbeiðsmarknaðin.

Esther er 34 ára gomul og ættað av Oyri. Hon er útbúgvin Cand.negot. Esher hevur royndir, sum sendimaður í Brússel frá 1998-2000 og hevur síðani starvast á Løgmansskrivstovuni, har hon m.a. hevur havt ábyrgdina av handilspolitiska økinum.

*Kelda: www.industry.fo*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ingibjørg Holm,** Hvalba, ættað úr Sandvík, fer til gravar úr Sandvíkar kirkju hósdagin klokkan 13.30. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Ingibjørg, kunnu lata Sandvíkar kirkju eina peningagávu.

**Tummas Johannesen,** Glyvrar, búsitandi í Keypmannahavn andaðist mánadagin 22. august, 48 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Kristian Johansen,** ættaður úr Sandavági, búsitandi í Hirtshals andaðist sunnukvøldið 21. august, 80 ára gamal.

*Kelda: Útvarpið*

Fróðskaparsetur Føroya:

## Altjóðaskeið í føroyskum á Føroyamálsdeildini

**Annað árið á rað hevur Føroyamálsdeildin skipað fyri altjóðaskeiði í føroyskum máli og mentan**

Skeiðið var í døgunum 1. til 20. august. 19 studentar úr hesum londum hava verið við á skeiðinum: Týsklandi, USA, Tailandi, Skotlandi, Onglandi, Niðurlondum, Spania og Íslandi. Stílað fyri skeiðinum fyri Føroyamálsdeildina hevur Zakaris Svabo Hansen, og saman við honum hevur Hjalmar P. Petersen tikið sær av málundirvísingini. Aftur at hesum hava fyrilestrar um fjølbroytt evni verið á skránni, eitt nú um bókmentir, munnbornan skaldskap, føroyska søgu, grindaveiði, landaog jarðfrøði, ungdómsmentan og fólkanøvn. Skipað hevur verið fyri vitjanum á søvnum, og fleiri útferðir hava eisini verið á skránni. Eftir ætlan – og er undirtøkan nóg stór – verður skipað fyri skeiði aftur um somu tíð komandi ár. Meira verður at síggja um tað á heimasíðu Fróðskaparsetursins: www.setur.fo



***Summarstudentarnir. Fremra rað f.v.:*** *Anke Hegemann, Týskland, Ingrid Werner, Týskland, Hagan Brunke, Týskland, og Kellie Holler, USA.*

***Miðraðið f.v.:*** *Andrea Hesse, Týskland, Guus Kroonen, Niðurlond, Anna-Kajsa Anderson, USA, Karin Heigl, Týskland, og Jennifer Henke, USA.*

***Aftasta rað f.v.:*** *Andrew Donaldson, Skotland, Oliver Watts, Ongland, Mariano González Campo, Spania, Christian Rebhan, Týskland, Jürgen Wunder, Týskland, Zakaris Svabo Hansen, lærari, og Katrin Fricke, Týskland. Á myndini vanta: Sasikan Nielsen, Tailand, Elizabeth Johnson, USA, Kristrún Guðmundsdóttir, Ísland, og Wolfram Prkno, Týskland.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá okkara elskaða dóttir, kona, mamma, vermamma og omma

**Ragnhild Olsen**

andaðist og varð borin til hvíldar.

Tøkk fyri kransar, blómur og peningagávur til kirkjuna í Rituvík.
Tøkk til øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað

*Familjunnar vegna*
**Marne**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt vístu samkenslu og hjálptu til, tá okkara góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Ásvør Árting,**
**Tórshavn**

doyði og og varð jarðað.

Ein serlig tøkk til tykkum á Lágargarði, sum vóru um hana.

*Familjunnar vegna*
**Joan og Kári**

Malan og Ragnhild Kjærbo:

## Listaframsýning í Ribarhúsi



Hesa og næstu vikuna hava møðgurnar Malan og Ragnhild Kjærbo framsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði við blýantstekningum og acrylmálningum.

Fernisering verður hóskvøldið 25. august frá kl. 19.00 - 21.00, har høvið verður at hitta listakvinnurnar.

Opið somu tíð sum handilin: 15.00 - 17.30 og leygardag 11.00 - 13.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagurin**

**24. august. Bartalsmessa** ella *bartalsøka*. Til minnis um lærusveinin Bartolomeus. Halgisøgan sigur, at tá ið ápostlarnir skiltust, fór hann eystureftir til Armeniu, Mesopotamiu og Indiu, har hann varð tikin av døgum av uppøstum avgudaprestum.
Í træskurðinum á einum av kirkjubøstólunum sæst hann við kvívi í hendi, ið sipar til, at hann varð flettur livandi. Navnið merkir sonur *Ptolemeusar*.
24. august 1943 var eitt løgtingsval, sum varð rópt *bartalsmessuvalið*.